# Nógvir skaðar kring landið





**Illveðrið mánadagin førdi við sær, at tryggingarfeløgini seinastu dagarnar hava havt úr at gera við at taka ímóti skaðafráboðanum**

SKAÐAVEÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum øll vita, var tað av ringasta veðri mánadagin. Vindurin var nógvur, og avfallið ikki minni. Vanliga avfallið í september mánaða er 139,2 millimetrar í miðal fyri allan mánaðin, men teir 24 tímarnar frá mánamorgni klokkan seks til týsmorgun klokkan seks komu ikki færri enn 49 millimetrar niður. Hetta hevði sjálvsagt fleiri vatnskaðar við sær, og tryggingarfeløgini siga, at tey hava fingið fleiri enn 100 skaðafráboðanir.

## Hvannasund harðast rakt

Tað er serliga í Hvannasundi, at stórur skaði er orsaka av illveðrinum. Hjá Tryggingarfelagnum Føroyar siga tey, at tað fyrst og fremst er í Hvannasundi, at nógvir skaðar eru, og tað eisini er har, at teir mest umfatandi skaðarnir eru. Sambært Tryggingarfelagnum Føroyar eru einir tríggir heilt stórir skaðar í bygdini, har kjallarar standa undir í vatni. Hvussu umfatandi skaðarnir eru, er greiða ikki fingin á enn, tí tey eru ikki liðug at turka upp enn, og tí fáa sýnsmennirnir ikki gjørt sínar metingar enn.

Tað hava tó eisini verið heilt fitt av skaðafráboðanum aðrastaðnis úr landinum, og bæði hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og Trygd nevna tey Suðuroynna sum eitt øki, har nógvir skaðar eru. Tó verður sagt, at fráboðanir eru komnar úr øllum landinum, men at Hvannasund er nógv harðast rakta økið í landinum.

Sambært tryggingarfeløgunum báðum, Tryggingarfelagið Føroyar og Trygd, er talan fyrst og fremst um vatnskaðar, men hjá Tryggingarfelagnum Føroyar siga tey seg tó eisini hava fingið fráboðanir um nakrar stormskaðar.

## Talið kann veksa

Sum áðurnevnt hava tryggingarfeløgini fingið fleiri enn 100 skaðafráboðanir, og tað er ikki óhugsandi, at talið fer at veksa. Stjórin á Trygd, Christian Nissen, sigur, at tað er væl møguligt, at onkur hevur verið burturstaddur, og tí ikki veit um skaðan enn, og somuleiðis er tað kanska onkur, sum enn ikki hevur sent skaðafráboðanina inn, sigur hann.

Stjórin á Trygd heldur tó ikki, at talan er um teir heilt stóru skaðarnar. – Eitt boð hjá mær er, at tær gott og væl 40 skaðafráboðanirnar, ið vit hava fingið, í miðal snúgva seg um skaðar fyri einar 5.000 krónur, so samanumtikið er talan ikki um stórar peningaupphæddir, ið fólk skulu hava endurgoldið.











# Fleiri túsund vitjaðu Gluggaglæmuna

**Stóra handverksstevnan Gluggaglæma, sum varð hildin í Müllers Pakkhúsi í Havn herfyri, var sera væleydnað. Fleiri túsund fólk vitjaðu stevnuna, har nøkur og tredivu fólk sýndu fram**

HANDVERKSSTEVNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Áhugin fyri føroyskum listahandverki er ovurhonds stórur. Hetta prógvaði talið av vitjandi á handverksstevnuni Gluggaglæma, sum júst er farin aftur um bak. Á stevnuni í Müllers Pakkhúsi kundu tey vitjandi síggja eitt nú tøvd pløgg, ymiskt vovið tilfar, hondgjørdar føroyskar prýðislutir og mangt annað.



*Ikki kann sigast annað, enn at tað riggaði bara heilt væl at gera hugnaligar básar í hølunum niðri í Müllers Pakkhúsi. Mynd: Jan Müller*

## Seldu væl

Stóra talið av vitjandi førdi eisini við sær, at framsýnararnir á handverksstevnuni seldu heilt væl, og tað er sjálvsagt at fegnast um. Tó hava keypararnir av framsýndu vørunum verið noyddir til at bíða til seinasta framsýningardagin, áðrenn teir kundu fáa hendur á keyptu vøruna, tí vøran skuldi verða við á framsýningini til hon var liðug.

Fyrireikararnir av Gluggaglæmu siga, at talið av vitjandi í miðal var oman fyri 300 um dagin. Havandi í huga at stevnan vardi níggju dagar, er skjótt at rokna seg fram til, at okkurt um 3000 fólk hava verið inni á gólvinum í hugnaligu hølunum í Müllers Pakkhúsi.

Sum áðurnevnt varð møguligt hjá teimum vitjandi at síggja tær mongu snotuligu vørurnar, ið tey ymisku listarfólkini høvdu evnað til. Harumframt varð eisini møguligt at síggja, hvussu listarfólkini arbeiddu, tí stevnan varð skipað soleiðis, at nógv verkstøð vóru. Á henda hátt bar til at síggja, hvussu listarfólkini arbeiddu seg fram til tað endaliga úrslitið.

## Afturvendandi tiltak

Tað vóru tær báðar, Jónhild Johannesen og Randi Vang, sum skipaðu fyri handverksstevnuni í Müllers Pakkhúsi. Tær hava áður skipað fyri Hendur og Hugflog, og er Gluggaglæma eitt slag av framhaldi av hesari framsýning.

Tær siga, at Gluggaglæma er ein avloysari fyri Hendur og Hugflog, men at stórur munur er á hesum báðum stevnum. Sum tey flestu óivað vita, so var Hendur og Hugflog í ítróttarhøllini á Hálsi, meðan Gluggaglæma júst hevur verið í Müllers Pakkhúsi, sum er væl minni, men ólíka hugnaligari. Somuleiðis hevði Gluggaglæma sum nakað nýtt arbeiðandi verkstøð, har tað, sum áðurnevnt, bar til at síggja listarfólkini arbeiða.

At Gluggaglæma eydnaðist so mikið væl í ar, og so nógv fólk vitjaðu handverksstevnuna, ger bara hugin til at skipa fyri slíkum tiltøkum enn størri, og fyrireikararnir av Gluggaglæmu ivast ikki í, at talan verður um eitt afturvendandi tiltak.



*Listarkvinnan Aase Bømler Olsen letur her Elin Lindenskov í ein av mongu vøkru troyggjunum.*
*Mynd: Jan Müller*



*Sum sæst á myndini vitjaði heilt fitt av fólki handverksstevnuna Gluggaglæma, sum júst er farin aftur um bak.*
*Mynd: Jan Müller*

# Poulina vann sjalkappingina

**Í sambandi við handverksstevnuna Gluggaglæma varð eisini skipað fyri einari sjalkapping. Ikki færri enn 60 uppskot komu inn, og vinnari gjørdist Poulina av Steinum á Argjum**

HANDVERKSKAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað kom ógvuliga óvart á stigtakararnar, at áhugin fyri sjalkappingini fór at verða so stórur. Tær høvdu frammanundan mett, at komu tað eini 15-20 uppskot inn, vóru tær vælnøgdar. Tað komu ikki færri enn 60 uppskot inn.

## Eggja til nýskapan

Høvuðsendamálið við sjalkappingini varð at eggja til nýskapan við íblástri úr teimum gomlu føroysku sniðunum. Sambært stigtakarunum til kappingina hava luttakararnir eisini tikið hetta til eftirtektar, tí hugflogið hevur sveimað víða, og sera nógv spennandi og áhugaverd uppskot komu inn.

Tá ið ein av fyriskiparunum av Gluggaglæmu, Randi Vang, kunngjørdi vinnaran á handverksstevnuni sunnudagin, segði hon millum annað: allar hava vunnið, skilt á tann hátt, at handverkið, sum heild, er sera væl úr hondum greitt. Tað hevur tí verið ein torfør uppgáva at velja fyrsta, annað og triðja vinnarasjalið. Dømingin er tí vektað nógv av, hvussu hugflogið hevur fingið frítt at fara.

Ein dómsnevnd, mannað við Lis Helgadóttir, Katrin í Gongini og Hanne Lisu Falk, gjørdi av, hvør ið skuldi hava fyrstuvirðisløn áljóðandi 5.000 krónur. Nummar tvey fekk 2.500 krónur, og nummar trý fekk 1.000 krónur.

Vinnari av kappingini gjørdist Poulina av Steinum á Argjum, nummar tvey gjørdist Oddny í Lon í Havn, meðan Marita Guttesen í Hoyvík gjørdist nummar trý.